# ðir alt árið

## Arbeiða kring alt landið

Tá teir báðir í AB Komfort bert eru tveir mans er avmarkað hvussu stórar uppgávur teir kunnu taka uppá seg.

Hinvegin so er lættari hjá teimum at átaka sær smærri uppgávur fyri fólk. Og arbeiðið trýtur ikki.

- Vit hava nokk at gera. Nógv smærri arbeiðir liggja fyri framman, m.a. innrættingar og umvælingar hjá fólki, sigur Rógvi Alfredsson.

Arbeiðsøkið teirra er í størstan mun her á vestara armi á Skálafjørðinum, men teir hava eisini verið aðrastaðni og arbeitt, millum annað í Havn.



*Teir eru júst í ferð við at leggja rand-dragarnarnar til enn eini sethús á Strondum. Aftaná verður farið undir at reisa húsini.*
Mynd: Jens Kr. Vang






# Marknaðarrák

**Oljan framvegis undir trýsti**

Hósdagin í farnu viku vóru fleiri búskapartøl á skránni. Í USA gjørdust brúkaraprísirnir sum væntað, meðan tølini vístu at fleiri hús vóru í gerð enn mett var frammanundan. Hetta fekk renturnar at hækka, men hesar lækkaðu tó aftur fríggjadagin og liggja nú á leið, sum fyri viku síðan. Oljuprísurin er framvegis lágur og var eitt skifti undir 50 dollarar fyri tunnuna. Hóast formaðurin í OPEC hevur sagt at tey fara at skerja framleiðsluna fyri at tryggja ein hægri oljuprís, bendir einki á, at oljuprísurin ávirkast av hesi útsøgn. Oljuprísurin, sum í løtuni stuðlar undir partabrævakursunum, verður aftur hesa vikuna í andglettinum.

**Lánsbrævarentur hækka**

10-ára lánsbrævarentan er nú 4,00%. Hon hevur verið støðug hesa farnu vikuna, men er hækkað 0,32% síðan 1. desembur. 1-árs rentan er enn hægri, 4,25%.

**Fraktraturnar hækkaðar**

Síðan ársbyrjan er kursurin á Mærsk hækkaður. Hetta kemst m.a. av, at fraktraturnar frá Kina, sum eru leiðandi fyri sjóflutningsídnaðin, eru hækkaðar nógv síðan ársbyrjan. Vón er fyri, at raturnar verða meira støðugar og at stóru lækkingarnar í 2006 ikki fara at endurtaka seg í 2007. Gongdin á ratunum er neyvt tengd at eftirspurninginum í amerikanska búskapinum.

Kursurin á Vestas hækkaði fyrr í vikuni, tá kappingarneytin Repower fekk eitt boð uppá helvtina av partabrøvunum. Gitingar eru nú frammi um, at Vestas eisini kann fáa eitt líknandi boð.

**Hesa vikuna.**

Komandi vikurnar verða spennandi. Tá fara virki at leggja fram roknskap. Íleggjarar fara tá at meta um, hvørt feløgini hava nátt settu málini, og hvat leiðslurnar meta um framtíðar inntøkurnar hjá virkjunum. Hetta saman við oljuprísinum, fer at seta dám á partabrævakursirnar komandi tíðina. Hósdagin koma ársroknskapir frá H&M og Nokia.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 575,59 | 0,6% | ↑ |
| JPY | 4,73 | -1,1% | ↓ |
| GBP | 1.137,58 | 2,6% | ↑ |
| NOK | 89,00 | -1,3% | ↓ |
| SEK | 81,68 | -0,2% | ↓ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,32 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 129,01 | 0,9% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 547,50 | -0,8% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,86 | -0,4% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*